## Finnland vann OL-bronsu í íshokki

Finnland vann bronsudystin ímóti Slovakia við úrslitinum 5-3. Finnland var á odda 1-0 aftaná tað fyrstu periodina uppá 20 minuttir. Í tí næstu periodini tók Slovakia yvir, og slovakar vóru á odda 3-1, tá 40 minuttir vóru farnir av dystinum. Men "Lejonit" sum finska liðið eitur millum manna í Finnlandi hevði ein ótrúligan endaspurt í tí triðju og seinastu periodini. Uppá bara tríggjar og ein hálvan minutt vendu finnar einum hóttandi 1-3 tapi til eina 4-3 leiðslu. Olli Jokinen frá tí kenda NHL-liðnum, New York Rangers gjørdist tann stóra hetjan, tá hann fyrst javnaði til 3-3, og síðani legði Lejonit á odda 4-3. Seinastu løtuna satsaði Slovakia alt, og tók málverjin út. Finnar brutu eitt slovakiskt álop ímóti dystarenda, og sendu pukkin í tað tóma slovakiska málið til endaliga úrslitið 5-3, og fagnaðurin vildi ongan enda taka.



## Real og Barca vísa vegin

Bæði Real Madrid og Barcelona vunnu sínar dystir í vikuskiftinum. Real Madrid var á vitjan hjá Tenerife. Høvðusstaðarliðið liðið vann heili 5-1. Gonzalo Higuaín var stóri spælarin hjá Real. Barcelona hevði vitjan av Malaga. Heimaliðið sat á øllum dystinum, men komu ikki á odda fyrr en tjúgu minuttir fyri tíð, tá Pedro roynti seg við skoti. Tíggju minuttir svaraðu gestirnir heldur óvantað aftur, við máli frá Valdo. Men bara nakrar fáar minuttir seinni legði Barcelona seg á odda aftur. Xavi spældi eina frálíka avlevering fram til Dani Alves, ið legði bóltin uppá tvørs til Lionel Messi, ið ikki hevði stórvegis trupuleikar at prika bóltin í netið. Barcelona er framvegis tvey stig frammanfyri Real Madrid. Tað eru heili trettan stig niður til nummar trý, ið er Valencia. Teir taptu sunnukvøldi 4-1 á útivølli móti Atletico Madrid.

# Greiðari ábyrgdarbýti

**Organisatión, álit og ein greiður skilnaður millum umsiting og nevndararbeiði eru hornasteinarnir, nú Christian Andreasen tekur við sum FSF-forseti**

Tá bæði valevnini høvdu orðið undan sjálvari atkvøðugreiðsluni til forsetavalið, var rættiliga stórur munur á tí, sum ført varð fram.

Neyvan munnu Christian Andreasen og Høgni í Stórustovu hava ymiskar fatanir um, at FSF skal vera til fyri feløgini. Men í taluni til fundarfólki var tað tann professinelli advokaturin móti idealistinum frá vøllinum.

Og tað vóru orð, sum nývaldi forsetin helt fast um, tá vit eftir fundin tosaðu við hann.

- Felagsskapurin er í dag vorðin somikið stórur, at tað er neyðugt við eini ávísari professionalismu. Eg skal ikki siga, at tað ikki hevur verið støðan undan hesum fundinum. Men har eru nøkur ting, sum mugu strammast upp, soleiðis at nevndin tekur sær av meira yvirordnaðum tingum, meðan umsitingin tekur sær av tí dagliga rakstrinum av FSF.

- Og so ræður tað um at fáa góð fólk í undirnevndirnar. Og tað er eingin, sum sigur, at tað bert eru starvsnevndarlimir, sum eru í hesum nevndum. Er tað góð fólk uttanfyri FSF, sum kunnu geva eitt gott ískoyti til arbeiðið við landsliðnum, ungdómsarbeiðnum og øðrum, so eiga vit sjálvandi at gera nýtslu av hesum. Eisini tí tað skapar eitt mótsetningsforhold millum nevndarlimir og



Hóast tað hevur staðið nógv á í valdystinum, so er virðingin millum nývalda og fyrrverandi forsetan stór. Og tað løgdu báðir eisini dent á, tá dysturin var av

Mynd: Álvur Haraldsen

feløg, tá hesir hava verið partur av málsviðgerðum. Tá hava feløgini fatað tað so, at limirnir hava tikið partí við ávísum feløgum, og tað er ongan tíð meiningin. Tí nevndin í FSF skal arbeiða fyri øll feløgini, sigur Christian Andreasen.

- Setningurin hjá nevndini verður at taka sær av yvirskipaðum málum og sjálvandi at leggja ta strategi, sum føroyskur fótbóltur skal virka eftir.

Tá tú tosar um strategi. Eru tað tá serlig viðurskifti, sum liggja tær serliga nær hjartanum?

- Tað er týdningarmikið, at vit fremja nakrar umskipanir, soleiðis at FSF verður meira fleiksibult og meira opið. Men eitt annað er eisini fíggjarligi parturin. FSF má hava eina neyvari fíggjarstýrin, men tað mugu feløgini so sanniliga eisini hava. FSF hevur hampuliga stórar ressourcir, og tað vildi verið áhugavert at vita, um vit ikki kunnu umfordeila hetta upp á onkran øðrvísi máta, sigur Christian Andreasen.

# Meira fótbólt og minni umsiting

**Høgni í Stórustovu vónar, at FSF fer at halda fokus á tí, sum gongur fyri seg á vøllinum, nú hann er farin frá sum FSF-forseti**

Sjálvur plagar hann at brúka fótbóltsterminologi'ina, tá støður í FSF skulu lýsast. Aðrastaðni á aðalfundinum varð hildið, at talan var um umdyst og brotssparkskapping, tá atkvøðurnar til forsetavalið vórðu taldar upp, men somikið spennandi helt Høgni í Stórustovu ikki, at tað hevði verið.

– Tað kendist alla tíðina, sum var mítt arbeiði upp til valið sera møðsamt. Og tá alt kom til alt, so hevði eg heldur ikki tað, sum skuldi til. Og tað haldi eg eisini, at úrslitið vísir.

– Millum annað komu eisini ting fram í gjárkvøldið um valrættin, og tað gjørdi so eisini, at eg kendi meg noyddan at taka eitt heldur óvanligt stig, segði Høgni í Stórustovu.

Var júst tann hendingin ikki enn ein ábending um, at talan var ikki um nakran dyst, men at talan heldur var um match-fixing, áðrenn dysturin nakran tíð varð spældur?

– Tað veit eg ikki. Dysturin varð so spældur í dag, og tað er tað, sum eg havi at siga um tann partin.

### Meira fótbólt í FSF

Nú Høgni fór frá, hevur hann sitið fýra ár í nevndini – harav tvey sum formaður. Og hóast hann uttan iva vildi, at skeiðið var longri enn sum so, so staðfesti hann, at kenslan er góð, nú hann leggur frá sær.

- Eg fór upp í hetta av fríum vilja, tí eg helt meg hava nakað at gera. Og tá eg stillaði upp móti Óla, vóru fortreytirnar tær somu. At um eg ikki vann, so var eg úti. Og tað er sum so eisini í lagi.

Tað tykist, sum hava tú og Christian øgiliga stóra virðing fyri hvørjum øðrum. Ger tað tapið lættari at bera, at tað var júst hann?

- Christian er jú at kalla húsfólk í Fótbóltssambandinum. Sjálvandi skal nakað av tilvenjing til, nú hann skal í ein politiskan leiklut, men tað skal nokk fara at ganga, sigur Høgni, sum samstundis leggur dent á, at er tørvur á hansara vitan, so stendur hann altíð til reiðar at hjálpa til.

Og hevur tú nøkur góð ráð um, hvønn veg FSF skal ganga, nú tú ikki heldur stýrisvølinum?

- Fyrst og fremst má hetta stríðið, sum hevur verið, leggjast aftur um bak, tí tað flytur fokus. Tað er umráðandi, at vit tora at halda fast um tey málini, sum verða sett, og at tað so verður arbeitt við, hvussu hesi mál verða rokkin.

- Og so hevur tað eisini týdning, at vit fáa tey fólkini inn, sum hava aðrar førleikar enn bara tað fyrisitingarliga. Eg hugsi til dømis um ein mann sum Magna Mohr, sum hevur eina enorma vitan, sum heilt víst átti at komið føroyskum fótbólti til góðar.

Altso meira fótbóltur og minni umsiting?

- Heilt víst. Hyggur tú at øðrum sambondum, so býr fyrisitingin í einum lítlum horni, meðan tann tekniski og ítróttarligi parturin er tann, sum fyllir mest. Og tað mugu vit koma til, sigur Høgni í Stórustovu at enda.

-mørk